## Avstralia brennur

Í avstralska landspartinum New South Wales stríðast sløkkiliðsmenn við at fáa tamarhald á meiri enn 100 skógareldum, sum men óvanliga nógvur hiti og frískur vindur gera arbeiðið sera torført. Ringast stendur til við býin Rylstone, sum er í útnyrðing úr Sidney. Sløkkiliðsstjórin í býnum mælti í gjár fólki til at fara úr húsunum, tí vandi er fyri, at eldurin fer at breiða seg nærri býnum. Har eysturi í Avstralia hevur hitin ligið oman fyri 40 stig teir seinastu dagarnar, men veðurmenninir siga nú frá minni hita og minni vindi, og tað fer at hjálpa sløkkiliðunum.



## Írland druknar

Írar stríðast í hesum døgum við vatnflóð, sum sambært teimum søgukønu er tann ringasta í landinum í heili 800 ár. Áhaldandi gloprarregn hevur havt við sær, at áirnar eru farnar upp um bakkarnar, nógvir býir standa undir í vatni, og nógvastaðni hava fólk mist streymin. Í býnum Cork er tað nógva regnið komið í ta kommunalu vatnveitingina, so myndugleikarnir hava verið noyddir at skrúva vatnið til 18.000 húsarhald í býnum fyri. Tað hevur eisini regnað illa í støðum í Onglandi og Skotlandi, men har siga veðurmenninir frá minni avfalli. Írsku veðurmenninir hava harafturímóti sagt frá meiri regni.

# Mugu sleppa at selja eisini

**- Okkara støða er greið. Vit hava søkt um loyvi at bryggja sterkt øl í minst 20 ár, men tað er neyðugt, at vit sjálvi eisini sleppa at selja ølið, tí annars druknar tað bara í floyminum av innfluttum øli, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór**

STERKT ØL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Einar Waag er fyri at markið upp á 5,8% verður strikað, men bert um teir framhaldandi sleppa at selja sítt øl av goymslunum hjá Føroya Bjór*

Í viðmerkingunum til uppskotið um loyvi at bryggja sterkt í Føroyum, verður nomið við brygging sum vinnu, og víst verður á, at tað nú bert er eitt bryggjarí eftir í Føroyum.

»Við undantaki av einstøkum londum, sum hava fullkomið bann fyri rúsdrekkaframleiðslu og -sølu, er loyvt í allar flestu londum kring heimin at bryggja øl, vín og brennivín. Forboðið at fara uppum 5,8% er serføroyskt, og sera ilt er at skilja hvørjum endamáli markið tænir«, verður sagt í viðmerkingunum.

Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, leingist eftir tí degi, tá markið á 5,8% verður tikið av.

- Heilt frá tí at Ivan Johannesen var vinnumálaráðharri, hava vit søkt um loyvi at bryggja sterkt øl í Føroyum, og allir vinnumálaráðharrarnir síðani hava fingið somu umsókn, sigur Einar Waag.

Men enn er so einki hent á økinum. Antin hevur ikki verið meiriluti fyri at fáa eitt uppskot um strikan av 5,8% markinum, ella hava ráðharrarnir snøgt sagt ikki tíma ella vilja gjørt nakað við málið.

- Vit hava ikki rættiliga trú upp á, at tað fór at lata seg gera at fáa markið í Føroyum avtikið, og tí hevur tað mest verið við útflutningi fyri eyga, at vit hava søkt um loyvi at bryggja sterkt øl í Føroyum, sigur Einar Waag.

### Øl partur av gourmetvinnu

Uppskotsstillararnir sanna eisini, at øl meiri og meiri vinnur fram sum partur av einari gourmetvinnu.

»Øl er seinastu árini komið nógv í fokus sum týðandi partur av einari matvinnu, sum byggir á dygdargóðar rávørur. Hetta er ein vaksandi vinna í londunum kring okkum, og øl verður nógv nýtt afturvið einum góðum bita á matstovunum«, verður sagt í viðmerkingunum.

Og hildið verður fram:

»Øl til kræsnar gómar er ein nissjuvinna, har vit kunnu gera okkum galdandi. Eisini er lítil ivi um, at fyri ferðavinnuna kundi føroysk framleiðsla av spesialøli verið við til at givið ferðafólki eina serstaka uppliving. Sum sendingin "ølfjeppararnir" eisini vísti, er áhugin fyri spesialøli stórur og vaksandi, og er nógv av serframleiddum er sterkari enn 5,8%«.

Sagt verður eisini, at bannið av sterkari øli er eitt haft um beinið hjá bryggjaríinnuni.

»Í Føroyum er ber eitt bryggjarí eftir í landinum. Eingin ivi eru um, at galdandi rúsdrekkalóg stikar hesa fyritøku inni, og skerjir hennara møguleikar at vaksa - bæði á heimamarknaðinum og á útlendskum marknaðum. Lógin forðar heilt einfalt fyri, at bryggjarí kunnu vera ein nissjuvinna og ein útflutningsvinna«, verður sagt í viðmerkingunum.

### Selja sjálvi

Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, dylur ikki fyri, at tað reint handverksliga er ein stór og spennandi avbjóðing at sleppa at bryggja sterkt øl í Føroyum. Men tað er fyri Føroya Bjór heilt avgerandi, at teir sleppa at selja ølið úr teirra goymslum kring landið.

- Sum uppskotið hjá Tjóðveldi fyri einum ári síðani ljóðaði, skuldi alt tað sterka ølið seljast í deildunum hjá Rúsuni kring landið. Men verður tað úrslitið, hava vit ongan áhuga í at sleppa at bryggja sterkt, tí tá dettur okkara øl burtur ímillum í stóra floyminum av útlendskum øli, sum heilt víst fer at verða innflutt, sigur Einar Waag.

Hann heldur, at tað er ilt at skilja, at ein sterk øl seld av einari av goymslunum hjá Føroya Bjór skal eggja til størri misnýtslu, enn um sama øl verður keypt í Rúsuni.

- Vit hava tilsamans fimm goymslur runt landið, og í summum førum eru tær í sama bygningi, sum Rúsan, so tað er ilt at skilja argumentatiónina fyri størri útbreiðslu, um vit sleppa at selja okkara egna øl, sigur Einar Waag.

Hann heldur eisini, at tað er undarligt ikki at sleppa at bryggja sterkt øl til útflutnings heldur.

- Í Íslandi høvdu teir forboð móti sterkum øli í tilsamans 75 ár, men kortini kundu bryggjaríini bryggja sterkt øl til útflutnings øll árini, sigur Einar Waag.

Fyribils er so bert at bíða eftir, hvørja lagnu nýggja uppskotið hjá Tjóðveldi og Kára á Rógvi fær í Tinginum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka**

**§ 1.**
Í løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 3, stk. 1 verður orðið "rúsdrekka" broytt til "rúsdrekka við meira enn 60 rúmprosentum av alkoholi".
2) § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis: "Stk. 2. Framleiðsla av rúsdrekka kann einans fara fram á góðkendum framleiðsluvirkjum. Landsstýrið fær heimild í kunngerð at áseta neyðugar treytir fyri góðkenning."
3) Í § 3, stk. 3 verður orðið "loyvinum"
4) Í § 6 verða orðini "øl, sum í sær hevur meira enn 5,8 rúmprosent av alkoholi, og annað" strikað.
5) Í § 7, stk. 2 verða orðini "øl, bryggjað í Føroyum" broytt til "rúsdrekka, framleitt í Føroyum".
6) Í § 8, stk. 1 verða orðini "smbr. § 3, stk. 2" broytt til "sum í sær hevur hægst 5,8 rúmprosent av alkoholi".
7) Í § 22, stk. 1, nr. 2 verður orðið "loyvi" broytt til "loyvi ella góðkenning".

**§ 2.**
Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. februar 2010.

# Blanda okkum ikki í styrkina

**- Fyri okkum er tað líkamikið, um fólk drekka sterkt øl ella ikki. Tað, sum hevur týdning fyri okkum, er at halda samlaðu nýtsluni niðri á teimum 6-7 litrunum av reinum alkoholi um árið, sum vit liggja á, sigur Pál Weihe, formaður í Fólkaheilsuráðnum**

STERKT ØL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fólkaheilsuráðið – sum fyrr nevndist Fyribyrgingarráðið – hevur onga støðu til, um vit skulu loyva sterkum øli í Føroyum ella ikki.

- Tað einasta, ið vit hyggja eftir, er fordeilingin av rúsdrekka, og tað er í høvuðsheitinum trý ting, vit arbeiða út frá. Og tað er atkomiligheit, hugburður og prísur, sigur Pál Weihe, formaður í Fólkaheilsuráðnum.

Hann sigur, at tað kann vera líkamikið, um fólk drekkur sterkt øl ella ikki, og um hetta kann keypast í Føroyum ella ikki.

- Tað vil altíð verða so, at misnýtarar finna fram til tað slagið, sum gevur mest alkohol fyri pengarnar, og tí er tað ein uppgáva, at tað ikki skal loysa seg peningaliga at keypa sterkari sløg, sigur Pál Weihe.

Føroyingar drekka í meðal 6-7 litrar av reinum alkoholi um árið, og fremsta uppgávan hjá Fólkaheilsuráðnum er at halda samlaðu nýtsluni niðri á teimum tølunum.

- Vit blanda okkum ikki í, um ølið er sterkt ella veikt, og vit hava heldur ongantíð úttalað okkum um hetta. Tí hava vit heldur onga støðu til hetta nýggja uppskotið um loyvi at bryggja sterkt í Føroyum, sigur Pál Weihe.



*Pál Weihe, formaður í Fólkaheilsuráðnum, sigur, at teir blanda seg ikki í, um loyvt verður at bryggja sterkt í Føroyum ella ikki*